# Sinnisbati visti einki

**Felagið Sinnisbati var ikki tikið við upp á ráð, tá Almanna- og Heilsumálaráðið tollaksmessudag keypti eini hús í Sandavági til sambýli fyri sinnisveik. Tað harmast formaðurin um**



*Soffi Egholm, formaður í Sinnisbata, fegnast um, at enn eitt sambýli til sinnisveik er fingið til vega. Men hon heldur, at Sinnisbati átti at fingið at vita um ætlanina, áðrenn hon varð fullføð*

SAMBÝLI

*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Sandavági:** Sinnisbati visti av ongum, fyrr enn hús vóru keypt í Sandavági til annað sambýli fyri sinnisveik. Tað harmast tey í Sinnisbata um, tí tey halda seg kunna vera til hjálp í slíkum førum, men vórðu ikki kunnað yvirhøvur.

– Vit eru slett ikki vitandi um hatta, sum nú er farið fram. Og eg undrist eisini á, at eini hús eru keypt afturat í Vágum. Tí eftir okkara meting er tørvurin størri aðrastaðni, sigur Soffi Egholm, sum er formaður í felagnum Sinnisbata, sum er áhugafelag teirra, sum líða av sinnisveikleika av onkrum slag.

Men hon skundar sær at leggja afturat, at Sinnibati sjálvandi á ongan hátt mótmælir tiltøkum, sum koma teimum, sum brúk hava fyri tí, til hjálp og nyttu. Og tey fegnast hóast alt um, at enn eitt hús er keypt til sambýli.

– Men vit høvdu kortini væntað, sigur Soffi Egholm, at vit fingu okkurt at vita um ætlaninar annað enn, at vit hava sæð eina lýsing í bløðunum, har søkt hevur verið eftir húsum í Vágum. Og at tað fór at ganga so skjótt fyri seg, vardi okkum ikki.

Hon sigur, at eftir teirra meting, hevði verið rættari at latið eitt slíkt sambýli upp í Suðruoy, tí har er størri tørvur enn eitt nú í Vágum. Og tað kundu tey sagt myndugleikunum, um tey í Sinnisbata vóru eftirspurd, sigur hon.

– Vit hava boðið okkum fram at vera til alla ta hjálp, vit á nakran hátt kunnu. Men hesaferð vóru vit hildin uttanfyri, sigur formaðurin í Sinnisbata.

Soffi Egholm sigur, at hon skilir væl grundgevingarnar hjá landsstýrismanninum, tá hann sigur, at tað fæst mest fyri pengarnar í Vágum. Og Sandavágur er eisini væl egnað til at leggja eitt slíkt sambýli. Serliga, tá eitt nú er har frammanundan. Har er stutt millum bygdirnar, og góðir møguleikar eru fyri aktivitetum hjá búfólkunum.

– Eingin ivi skal vera um, at Sinnisbati bakkar øll tiltøk, sum bera bata við sær, upp. Men vit høvdu verið fegin, um vit eisini kundu verið við til at givið ta hjálp og vegleiðing, sum vit bjóða fram, sigur hon.

# Danir áhugaðir í tyrluflúgving í Føroyum

**Verður tað sum fólkini aftan fyri danska tyrlufelagið Dan Helicopters ætla, fer føroyska tyrlan at fáa kapping á innanoyggja rutuni. Dan Helicopters ætlar at søkja Ferðslumálaráðið um loyvi til at reka tyrluflúgving í Føroyum**




*Føroyska tyrlan fer at fáa kapping á innaoyggjarutuni, um gongur sum tey, ið mynda danska tyrlufelagið Dan Helicopters ætla*
Mynd: Edvard Joensen

SAMFERÐSLA

*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

Umboð fyri eitt danskt tyrlufelag hava á fundi í Vinnumálaráðnum boðað landsstýrismanninum við vinnumálum frá, at tey eru áhugað í at sleppa at reka tyrluflúgving í Føroyum.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, váttar at umboð fyri danska tyrlufelagið Dan Helicopters á fundi í Vinnumálráðnum fyri umleið einum mána síðan, hava greitt honum frá, at felagið ætlar at søkja danska Ferðslumálaráðið um loyvi at reka tyrluflúgving í Føroyum.

– Vinnumálaráðið hevur ongan mynduleika á hesum økinum, sigur Bjarni Djurholm. Skal loyvi gevast, skal tað vera frá danska Ferðslumálaráðnum. Men Ferðslumálaráðið kunnar tó fyrst Vinnumálaráðið um ætlanina, og so kann Vinnumálaráðið viðmæla ella mæla frá at geva slíkt loyvi.

– Men enn er einki sum helst, ið bendir á nakra umsókn, komið frá Ferðslumálaráðnum, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður. Tí hevur hann einki at taka nakra støðu til, og vil tí heldur ikki gera fleiri viðmerkingar til málið.

Hann sigur, at hann á fundinum í Vinnumálaráðnum greiddi frá, at arbeitt verður við at frígeva samferðsluna í Føroyum, og eisini til og úr Føroyum, sum hann tekur til.

Tað vil siga, at tað verður flogfeløgunum frítt at flúgva til Føroya, sum teimum lystir. Men tað verður kortini ikki fyrr enn í fyrsta lagi um eini tvey ár ella so, sigur hann. Tað fer so eisini at galda innanoyggja tyrluflúgving, um tað verður so, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum.